# Kunngerð

Boðað verður frá, at **fólkatingsval** er útskrivað. Ríkisumboðsmaðurin hevur ásett valdagin til at verða **týsdagin 20. november 2001.**

Atkvøðugreiðslan fer fram í skúlanum, í stovu nr. 3.

**Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 9.00 fyrrapart og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.**

Veljarar, sum eru burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi leygardagin 17. november 2001 greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 332004.

Valkort verða send út og skulu havast við, tá atkvøtt verður.

**Sørvágs Kommuna**

# Hús í miðbýnum í Havn

Húsini hava umleið 110 fermetrar búøki í trimum hæddum – alt innrættað. Lítil urtagarður er um húsini.
Loft: 2 kømur og wc.
Miðhædd: stova og køkur.
Kjallari: 2 kømur, klædnarúm og baðirúm.

Húsini, sum upprunaliga eru 200 ára gomul, eru høvuðsuppvæld uttan og innan 1997–1999. Verða seld fyri hægsta boð.

**Tlf. 319775**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## MÁLSVIÐGERI TIL BYGGI- 0G BÝARSKIPANARDEILDINA

Søkt verður eftir starvsfólki við tekniskari útbúgving til byggimálsviðgerð o.a. at byrja beinanvegin. Talan er um eitt fulltíðarstarv á byggi- og býarskipanardeildini.

**Høvuðsuppgávur**
- Byggimálsviðgerð.
- Byggieftirlit.
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanarnevndina, og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum.
- Samskifta við borgarar, feløg og stovnar.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari, byggifrøðingur, verkfrøðingur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

Umsøkjarin skal duga væl føroyskt og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad/MicroStation GeoOutlook.

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett beinanvegin ella skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv , ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 10.12.2001. Viðmerkt á umsóknina "starv á byggi- og býarskipanardeildini".

SNARSKIVAN

# Rætting til kunngerð

## um fólkatingsval í Fuglafjarðar kommunu.

**Til veljarar til fólkatingsvalið 20. november 2001 í Fuglafjarðar kommunu.**

Vísandi til kap. 6, § 24, stk. 2 í »Lov om folketingsvalg på Færøerne nr. 458 af 30. juni 1993«, so skal hervið verða kunngjørt, at atkvøðugreiðslan fer fram í býráðssalinum týsdagin tann 20. november 2001 fyri bygdirnar Fuglafjørður og Kambsdalur og í sethúsunum hjá Annu Jensen fyri Hellurnar.

Atkvøtt verður millum kl. 09.00 og 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógini hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð mánadag til fríggjadag millum kl. 10.00 og 15.00 og leygardagin tann 17. november millum kl. 10.00 og 14.00, sum er seinasti rættstundis dagur fyri brævatkvøðugreiðslu.

Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006 í seinasta lagi fríggjadagin tann 16. november 2001 kl. 15.00.

Valkort skulu verða nýtt við valavgreiðsluna, og eru hesi send veljarunum út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til býráðsskrivstovuna skjótast gjørligt.

Fuglafjørður, tann 13. november 2001
**Fuglafjarðar býráð**

# Kunngerð

**Til veljarar til fólkatingsvalið 20. november 2001 í Sumbiar Kommunu**

**Atkvøðugreiðslan fer fram týsdagin 20. november 2001 á hesum støðum:**

Fyri bygdirnar Lopra og Akrar
— **í skúlanum á Leiti**

Fyri bygdinar Víkarbyrgi og Sumba
— **í skúlanum í Sumba**

Atkvøðutíðin er millum kl. 09.00 og kl. 20.00 og heldur fram, so leingi veljarar møta uttan støðg.

Veljarar, ið sambært vallógina hava rætt til at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á fólkayvirlitinum til og við **leygardagin 17. november 2001**, ring tlf. 373506 og avtala tíð.

Tey, sum vegna sjúku ikki kunnu koma á valstøðini, kunnu velja heima við at venda sær til bygdarráðsskrivstovuna telefon 370344 ella 373506.

Valkort skulu verða nýtt við valavgreiðsluna, og eru hesi send veljarunum. Veljari, sum ikki fær valkort ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til bygdarráðsskrivstovuna skjótast gjørligt.

*Sumba, tann 14. november 2001*
**Sumbiar Kommuna**

# Háskúlaskeiðið

frá 7. januar til síðst í juni **2002**

fjølbroytt undirvísing og mennandi upplivingar

**Føroya Fólkaháskúli**

Set teg í samband við okkum um gjøllari upplýsingar

Háskúlavegur 14 - 100 Tórshavn - tlf. 31 17 43
fax. 31 96 87 - Teldupostur: ffh@skulin.fo
Heimasíða: www.skulin.fo/ffh

# Bilsmiður søkist

Vit søkja eftir bilsmiði til verkstað okkara at byrja skjótast møguligt. Um hetta hevur tín áhuga, set teg í samband við verkstaðarleiðaran Óla Niclassen, tlf. 310600, lokal 12, ella send okkum eina umsókn.

Pf. D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15
100 Tórshavn
Tlf. 310 600

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir




## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Føroyar eru ikki hjartamálið hjá dønum

**Olga Biskopstø**
*Fólkatingsvalevni hjá Tjóðveldisflokkinum*
*www.biskopsto.com*



Men at okkara sjálvsavgerðarrættur er tengdur at hugburðinum hjá dønum er ein veruleiki, ið vit ikki kunnu snúgva okkum uttanum.

Í amtstíðini vistu danir líka lítið um Føroyar sum í dag, men teir sóu føroyingar sum runnar av somu norðurlendsku rót sum danskarar. Tí kundu teir í mongum førum vera positivir yvirfyri føroyingum, sjálvt um tað var uppá ein niðursetandi máta, tí vit vóru á einum lægri menningarstigi.

Í dag eru danskarar so sterkt orienteraðir ímóti ES, at tað norðurlendska hevur mist sína megi sum nakað, ið skapar samanhang fyri danskarar, tá íð tað kemur til upplýsing um Føroyar. Avleiðingin fyri okkum er, at allar upplýsingar í Danmark um Føroyar eru fullkomuliga leysrivnar frá øllum samanhangi, - antin sum partur av donskum innanríkispolitikki ella sum gølusøgur.

Í báðum førum hongur hettar saman við ríkisrættarligu støðuni. Tí, ríkisrættarliga støðan ger, at tað ber til at gera eitt samband, eitt link, ímillum danska skattgjaldaran og so hesar fullkomuliga ábyrgdarleysu føroyingarnar, sum bara brúka og brúka, meðan onnur gjalda… Vóru Føroyar ein sjálvstøðug tjóð, so var tað fullkomuliga óinteressant fyri danskarar, hvussu nógvar tunlar, vit gera, og hvussu nýggjum bilum vit koyra í o.s.frv.

Skulu danskarar vita meira um Føroyar, so má hetta linki brótast. Vissi Føroyar vóru ein sjálvstøðug tjóð, so hevði samskiftið millum føroyingar og danskarar, millum danskar myndugleikar og føroyskar myndugleikar verið av einum heilt øðrum slag og meira virðilig, sjálvandi.

Tann manglandi vitanin er ein av høvuðsorsøkunum til, at ynski okkara um at gerast sjálvbjargin og sjálvstøðug, ikki hevur verið virt av donsku myndugleikunum og danska fólkinum sum heild. Tí verður upplýsing í Danmark eitt amboð í fullveldisstríðnum.

Við hesum verður heitt á øll fullveldisfólk um at fara á val - hesuferð - so full vissa kann fáast fyri, at tey sum komandi fýra árini skulu umboða føroyafólk eru fullveldisfólk, og tí eisini við fullum huga fara at arbeiða til frama fyri fullveldi.

# Kommunuskuldin og fólkatingsvalið

**Jákup Lamhauge**
*Valevni Sambandsflokksina*



Í framløgusending fólkafloksins í útvarpinum var nógv reyp at hoyra frá valevnum flokksins - ja sum framløgan varð borðin fram so kannaði fólkaflokkurin sær alla æruna av tí, sum hent var í samgonguskeiðnum.

Eg ætli mær ikki at taka dagar ímillum hvør av samgonguflokkunum eigur størstu æruna av tí vandapolitikki sum førdur er farna valskeið - hetta býti skulu teir sjálvir sleppa at standa fyri.

Men tá fólkaflokkurin tekur sær æruna av, at kommunuskuldin er niðurgoldin til helmingin av tí sum hon var fyri fýra árum síðan, so haldi eg at reyp fólkafloksins er farið langt út um tað teir kunnu loyva sær - ikki minst moralskt.

Sum formaður í einum av størru kommununum seinastu átta árini kann eg upplýsa fyri fólkaflokkinum og Føroya fólki annars, at fólkaflokkurin als ongan lut eigur í, at kommunuskuldin er niðurgoldin til tað sum hon í veruleikanum er í dag. -

Saman við 5-ára lániavtaluni sum kommunurnar fingu við lániveitarar sínar, uppgangstíðirnar í samfelagnum, og ábyrgdafulla fíggjarpolitikkin hjá kommununum hevur tað eydnast kommununum at gjalda niður uppá láni-skuldina - soleiðis at flestu kommunur í dag hava vunnið sítt kredittvirði aftur og tí kunnu virka sum frælsar kommunur uttan íblanding av øðrum myndugleika.

Spurningurin er um fólkaflokkurin og samgongan annars kann siga tað sama um fíggjarstøðuna í føroyska landshúsarhaldinum - meta hesir flokkar at føroyska samfelagi hevur vunnið tað fíggjarfrælsi sum skal til fyri at veita ta trygd sum borgarin hevur brúk fyri?

Onki er at ivast í ,at mangur føroyingur stendur spyrjandi í dag og tað av góðum grundum.

Spurningarnir eru annars mangir sum hanga í luftini ósvaraðir - m.a. hvussu fólkaflokkurin og samgongan annars ætla at fíggja tær 400 mill. kr. sum blokkurin minkar á nýttárinum.

Ikki bert Sambandsflokkurin ynskir eitt greitt svar,men tað vil føroya fólk eisin hava - hetta hava tey krav uppá.

# Vit velja samstarv

**Elin Lindenskov**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Øll vita, at loysingarpolitikkurin hjá landsstýrinum er koyrdur fastur. Konfrontatiónspolitikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum førir ikki til nakra loysn, og afturhaldssinnið hjá Sambandsflokkinum førir okkum bara í hina grøvina.

Vit í Javnaðarflokkinum ynskja eina aðra loysn - eina loysn, sum byggir á føroyska fólkaynskið um broytingar í ríkisrættarviðurskiftinum. Fleiri veljarakanningar hava víst, at fólkið ikki ynskir loysing og heldur ikki afturhaldið hjá Sambandsflokkinum. Ferð eftir ferð hava hesar kanningar víst, at fólkið ynskir víðkað sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

Sjálvstýrislógin hjá Javnaðarflokkinum byggir júst á hetta fólkaynskið. Við hesi lóg fær løgtingið fult vald í øllum yvirtiknum málum, og tað verður løgtingið - og harvið føroyska fólkið - sum ger av, hvørji mál verða tikin yvir

Sjálvstýrislógin er ein sáttmáli á altjóa rættarligum støði, sum greitt staðfestir, at føroyska fólkið hevur fullan avgerðarrætt gjøgnum løgtingið.

Danir eru sinnaðir til broytingar - broytingar, sum føroyska fólkið tekur undir við. Tí er tað av alstjórum týdningi, at okkara fólkavaldu eftirlíka breiða fólkaviljanum. Og tað er hetta, vit vilja brúka fólkatingsumboðanina til, og tað er hetta, sum Javnaðarflokkurin eisini fer at stríðast fyri til løgtingsvalið komandi.

Javnaðarflokkurin vil samstarv og loysnir.

# Vinnustuðulin brúktur til almanna og heilsuøki

**Annita á Fríðriksmørk**
*valevni Tjóðveldisfloksins*



Tað sæst í teimumtrimum undanfarnu fíggjarlógum, at tey øki, sum hava fingið hægri raðfesting enn nakrantíð, eru almannøki, heilsuøki og skúlin.

Men hvussu ber tað til, at hesi øki kunnu fáa eina økta raðfesting uppá 600 milliónir, tá vit kortini hava megnað at spart 1,5 milliardir saman.

Jú, tað er millum annað tí, at vinnu- og fiskivinnustuðulin er so at siga burtur, og tí at vit hava havt eina fasta hond á íløgusíðuni.

**Vinnustuðulin brúktur til almanna og heilsuøki.**
Fiskivinnan FEKK stuðul, Alivinnan FEKK stuðul, og Skipasmiðan FEKK stuðul. Men hygg í dag, stuðulin er burtur. Ikki bara í krónum og oyrum, men hugburðurin er somuleiðis broyttur. Eftir tógvið stríð í samgonguni eydnaðist tað Tjóðveldisflokkinum, at sannføra hinar um, at stuðulspolitikkurin til vinnuna, var ongin gongd leið at ganga. Heldur ikki um nógvir pengar vóru í landskassanum. Vit vildu heldur økja raðfestingina til tey bleytu virðini og føra ein ábyrgdarfullan búskaparpolitikk, sum miðar eftir sjálvbjargnum búskapi.

Hesin politikkur tekur tíð, men má fyri alt í verðini sleppa at halda fram.

**Føroyar og Danmark tveir samstarvspartnarar.**
Á Danatingi eiga vit at brúka røðarapallin, til at tosa um tey statsrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, um hvørjir trupulleikar eru við galdandi skipan, bæði búskaparliga, samfelagsliga, sosialt og mentunarliga.

Og soleiðis fáa fólkatingið at skilja, hví vit vilja hava evsta vald yvir okkara egna landið, hví vit vilja viðurkennast sum tjóð, hví vit vilja hava eitt javnbjóðis samstarv við danir osfr osfr.

Hesin politikkur má fáa eina byrjan á fólkatingið aftaná 20. nov. Hann skapar virðing millum mannað og mennir eitt veruligt samband við danir.

X við Tjóðveldisflokkin.